# Blái Krossur Føroya bjartskygdur



- Á veitsludøgurðanum fekk Blái Krossur ein málning í 100 ára føðingardagsgávu frá Heimamissiónini



- Fleiri nýttu høvi, at siga sína hugsan um "Rúsdrekkamentan í Føroyum um 20 ár" á pallborðsfundinum leygardagin



- Martin Kúrberg, Harriet Lamhauge og Jógvan á Lakjuni sótu við pallborðið

**Á aðalfundinum hjá Bláa Krossi Føroya leygardagin varð Sverri Steinhólm afturvaldur sum formaður, og Kaj Eli Hansen valdur sum næstformaður. Annars var meir gjørt burturúr aðalfundinum hesuferð, av tí at tað í ár eru 100 ár síðani Blái Krossur varð stovnaður í Føroyum**

*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*

Í nevndina hjá Bláa Krossi komu eisini Ernst Pólsson, Harriet Lamhauge, Kristianna Vang, Regin Jacobsen, Gimme Olsen og Súni F. Olsen, sum eisini umboðar BláaKrossUngdóm. Gimme Olsen er nývaldur fyri Jaspur Langaard, sum gjørdist nýggi aðalskrivari í felagnum fyrr í ár.

### Bjartskygd

Kaj Eli Hansen sigur, at hóast nógv bendir á tað øvuta, eru tey bjartskygd, tá tað ræður um at tálma rúsdrekkanýtsluni í Føroyum. Og á pallborðsfundinum um "Rúsdrekkamentan í Føroyum um 20 ár" vóru nógvir glottar at hóma.

- Vit hava góðar vónir um, at verkætlanin "Børn í vanda" fer at vera við til at venda gongdini tann rætta vegin. Fyri fyrstu ferð í Føroyum verður nú eitt skipað og støðugt arbeiði gjørt fyri at kunna foreldur um ta ávirkan, rúsdrekkanýtsla hevur á børnini. Tórhild Bjarkhamar hevur gjørt eitt megnararbeiðið á hesum økinum, og alt bendir á, at tey eru nógv, ið hava saknað eitt upplýsingarátak sum hetta, sigur Kaj Eli.

- Enn er ov tíðliga at gera sær nakrar niðustøður av hesum arbeiðinum. Men tað er ein sannroynd, at vilt tú røkka langtíðarúrslitum, mást tú byrja við børnunum. Ikki við lyftum peikifingrum, men við at gera foreldrini meir tilvitað um, hvørja ávirkan tað hevur á børnini, um tey javnan síggja rúsdrekka á borðinum.

- Vit vita jú ikki, hvat børn hugsa í slíkum førum. Hvussu ávirkar tað hugburðin hjá børnum til rúsdrekka, um vit gera rúsdrekka til ein part av gerandisdegnum? Tað er ein av spurningunum, verkætlanin "Børn í vanda" miðar eftir at lýsa nærri, sigur Kaj Eli.

### Misvísandi mynd

Hinvegin dylur Kaj Eli ikki yvir, at rákið í samfelagnum ofta tykist ganga ímóti fráhaldsrørsluni.

- Vit royna áhaldandi at ávirka politikarar til at steðga á og ikki bara fara fram eftir fummum, tá tað snýr seg um at útvega skeinkiloyvi og liberalisera rúsdrekkasøluna sum heild. Tíverri er tað so, at tey sum rópa harðast ofta verða hoyrd best. Og tað er jú ikki nøkur loyna, at fjølmiðlarnir ofta vísa eini umsókn um skeinkiloyvi munandi størri áhuga, enn til dømis eini ráðstevnu um fráhaldsarbeiðið.

- Tað ger heldur ikki okkara arbeiði lættari, at rúsdrekkanýtsla ofta verður tengd at øðrum samfelagsviðurskiftum, sum til dømis ferðavinnuni. Seinastu árini hava sjónarmið verið frammi, sum halda uppá, at føroyskur rúsdrekkapolitikkur skaðar bæði ferðavinnuna og okkara altjóða umdømi. Samstundis eru vit errin av okkara aldargomlu føroysku mentan og vilja fegin vísa hana fram fyri øðrum. Tað vilja vit eisini fegin, men vita halda tað vera misvísandi at geva ferðafólki eina fatan av, at rúsdrekka er partur av føroyskari mentan ella gerandisdegnum hjá føroyingum, sigur Kaj Eli.

### Rúsevni

Men arbeiðið hjá Bláa Krossi snýr seg ikki bara um at tálma rúsdrekkanýtsluni. Rúsevnisnýtsla vindur alsamt meir uppá seg, serliga millum tey ungu, og tey gerast fleiri og fleiri, ið søkja sær hjálp fyri misnýtslu av rúsevnum.

- Hesin trupulleikin er eitt sindur øðrvísi, við tað at rúsevni eru ólóglig, og vit harvið hava lógina í rygginum. Men lógin er ikki altíð nokk til at forða fólki í at traðka við síðuna av. Tí síggja vit eisini hendan trupulleikan sum ein av stóru uppgávunum hjá Bláa Krossi í framtíðini, sig Kaj Eli Hansen.



*Tórhild Bjarkhamar stendur á odda fyri verkætlanini "Børn í vanda."*

### Mateskjur til børnini

Umframt nevndarvalið, vóru nógv ymisk tiltøk á skránni hjá Bláa Krossi fríggjadagin og leygardagin. Leygarkvøldi vóru umleið 100 fólk savnaði til til veitsludøgurða á Runavíkar Sjómannsheimi, har Heimamissiónin handaði Bláa Krossi ein málning í føðingardagsgávu.

Á familjumøtinum sunnudagin vóru tað børnini, sum fingu føðingardagsgávu frá Bláa Krossi. Har fingu øll børnini hvør sína bláu og hvítu Blákross mateskju við Sunkist og øðrum góðum í. Eisini var Angela við til Familjumøtið, og sjálvandi dámdu børnunum hetta sera væl. Familjumøtið var skipað sum ein sunnudagsskúli fyri øll. Eitt sera væleydnað tiltak, har eini 4-500 fólk tóku lut.



Starvsmannafelagið:

# Ólóglig mannagongd í SVF

**– Av eini ella aðrari orsøk leyp Sjónvarp Føroya um hoyringarnar, tá teir seks deildarleiðararnir í SVF vórðu sagdir úr sínum leiðarastørvum, og er hetta beinleiðis í stríð við fyrisitingarlógina, sigur Gunnleivur Dalsgaard í Starvsmannafelagnum. Sjónvarpið hevur tikið ónøgdina til eftirtektar**

UPPSAGNIR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*Lógarásettu hoyringarnar vórðu lopnar um við beinleiðis boðum um uppsøgn, tá tíðindaleiðararnir í SVF vórðu sagdir úr sínum leiðarastørvurm, og hetta hava vit nú fingið broytt, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum, Gunnleivur Dalsgaard*

Tað kom sera dátt við, tá seks deildarleiðarar fyri hálvu aðru viku síðani fingu fráboðan um, at teir vórðu sagdir úr sínum leiðarastørvum í Sjónvarpi Føroya. Orsøkirnar vóru bygnaðarbroytingar fyri at fáa eitt smidligari og professionellari sjónvarp, har fýra deildir innan framleiðslu av sendingum vórðu niðurlagdar. Hesar eru tíðindadeildin, mentanardeildin, samskiftisdeildin og framleiðsludeildin, og leiðararnir av hesum deildum fingu boð um, at teir vórðu sagdir úr starvi.

### Gloymdar hoyringar

Viðkomandi starvsfólk eru limir í Starvsmannafelagnum, og fakfelagsformaðurin Gunnleivur Dalsgaard sigur, at mannagongdin hjá leiðsluni í SVF ikki hevur verið sambært lógini.

– Fyrisitingarlógin ásetur, at starvsfólkini hava rættin til hoyringar, og hetta skal altíð gerast, áðrenn nakar verður sagdur úr starvi, slær fakfelagsleiðarin fast. Við tað at SVF leyp um hoyringarnar, hevur Starvsmannafelagið víst sína ónøgd við skeivu mannagongdina, og hevur SVF leiðslan tikið hetta til eftirtektar.

– Í staðin fyri beinleiðis uppsagnir vórðu hoyringar seint í seinastu viku sendar deildarleiðarunum, og ikki fyrr enn hoyringsfreistin er úti tíðliga í apríl, kann støða takast til, hvat víðari fer fram, sigur Gunnleivur Dalsgaard.

Hoyringin fer fram skrivliga, og er hetta ein lógarbundin gongd, har deildarleiðarar sambært Gunnleivi eiga at fáa eina góða og grundleggjandi frágreiðing um, hví teir eru sagdir úr starvi, so teir eisini hava møguleikan at koma til orðanna.

– Men hesar hoyringar vórðu lopnar um við beinleiðis boðum um uppsøgn, og hetta hava vit nú fingið broytt, staðfestir formaðurin í Starvsmannafelagnum. Hóast fakfelagið ikki kann avgerða, hvat endaliga úrslitið verður, er ábyrgdin sambært formanninum altíð at tryggja tey rættindi, limirnir hava.

– Nú er hoyringsprosessin í gongd, og so dugi eg ikki at siga, hvat víðari hendir, endar Gunnleivur Dalsgaard, formaður í Starvsmannafelagnum.

# Føroya Tele afturgongd á 12%

**Fríggjadagin hevði Føroya Tele aðalfund, og ársroknskapurin í 2003 vísti eina afturgongd á 12%**

ÁRSROKNSKAPUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Risafyritøkan Føroya Tele legði fríggjadagin á aðalfundi fram ársroknskapin fyri 2003, og vøksturin, sum seinastu árini hevur ligið á umleið 10%, steðgaði í fjør. Føroya Tele vísir í tíðindaskrivi á, at orsøkin tykist vera í samfelagsbúskaparligu stagnatiónini umframt eini alsamt harðari kapping á økinum.

### Yvirskot á 47 millliónir

Úrslitið í 2003 gjørdist 47,1 millión, eftir at 11,1 millión eru settar av til skatt. Talan er um eina minking á 6,4 milliónir samanborið við 2002, og tað gevur eina afturgongd á 12%.

Høvuðsíløgurnar í 2003 vórðu gjørdar í FarIce kaðalin, sum knýtir Føroyar saman við Skotlandi og Íslandi, nýggja høvuðssætið í Hoyvík og fyrireikingar til breiðband. Føroya Tele hevur í 2003 økt munandi um netto íløgurnar, sum vórðu gjørdar fyri heilar 137,7 milliónir, og tað er meira enn tvífalt íløgurnar í 2002. Tá vóru íløgur gjørdar fyri 61,3 milliónir. Samtykt var eisini á aðalfundinum, at 11 milliónir verða útgoldnar til partaeigaran Føroya Landsstýri sum vinningsbýti. Eginpeningurin var við árslok 2003 294,2 milliónir.

### Nøktandi úrslit

Føroya Tele metir sum heild, at talan er um eitt nøktandi úrslit, men hinvegin verður ásannað, at við støði í yvirornaðu búskapargondini verður úrslitið í 2004 helst minni enn í 2003.

Á aðalfundinum fríggjadagin varð nevnd eisini vald, og aðalfundarvaldu nevndarlimirnir eru Hákun Steingrímsson (formaður), Reidar Nónfjall (næstformaður), Tage M. Iversen og Jógvan E. Ellefsen. Starvsfólkavaldu nevndarlimirnir eru Janus Djurhuus og Bjørg Joensen.




*Ovasti myndugleikin í Føroya Tele, Andras Róin, legði á aðalfundi fríggjadagin fram ársroknskapin 2003, sum vísti eina afturgongd á 12%. Hetta verður tó mett at vera eitt nøktandi úrslit*

Sjónvarpsstjórin:

# Brøvini eru misskild

**– Tað hevur frá byrjan verið ætlanin at halda allar ásetingar við hoyringum, sigur sjónvarpsstjórin Mikkjal Helmsdal. Misskiljingin viðvíkjandi hoyringum er orsakað av ógreiðum orðingum í upprunaligu brøvunum**

UPPSAGNIR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*– Orsøkin til misskiljingina er, at fyrstu brøvini ikki vórðu orðað nóg greitt, og tískil valdu vit at taka tey aftur og orða av nýggjum, sigur Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri*

Eftir at Gunnleivur Dalsgaard aðrastaðni á síðuni vísir á skeivu mannagongdirnar í SVF, tá seks tíðindaleiðarar vórðu sagdir úr leiðarastørvum sínum, sigur sjónvarpsstjórin Mikkjal Helmsdal, at hetta ongantíð var ætlanin.

– Orsøkin er, at fyrstu brøvini ikki vórðu orðað nóg greitt, og tískil valdu vit at taka tey aftur og orða av nýggjum, so eingin ivi skuldi vera um nakað, sigur Mikkjal Helmsdal. Sjónvarpsstjórin undirstrikar, at tað ongantíð hevur verið ætlanin at leypa um nakrar ásetingar, men at ógreiðu formuleringarnar í brøvunum hava volt misskiljingar.

– Tað arbeiðið hava vit ikki gjørt nóg væl, og tískil hava vit sent brøvini av nýggjum, sigur ovasti myndugleikin í sjónvarpinum.

### Onga ávirkan

Nú er so møguleikin hjá uppsagdu deildarleiðarunum at siga sína hugsan undir hoyringunum, men hetta fær ongar avleiðingar fyri endaliga úrslitið í gongdini.

– Ætlanin og endámálið við bygnaðarbroytingunum er tað sama, og tískil fáa hoyringarnar ikki nakrar avleiðingar á ta avgerð, vit hava tikið, sigur sjónvarpsstjórin Mikkjal Helmsdal at enda.